# ítróttur

Nr. 215 • hósdagur • 4. mai 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

**Flogbóltsstøður**

**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 4 | 4 - 0 | 12 | 3 | 9 | 8 |
| 2 KÍF | 4 | 3 - 1 | 9 | 5 | 4 | 6 |
| 3 Dráttur | 4 | 2 - 2 | 10 | 7 | 3 | 4 |
| 4 TB | 3 | 2 - 1 | 6 | 4 | 2 | 4 |
| 5 ÍF | 3 | 0 - 3 | 2 | 9 | -7 | 0 |
| 6 SÍ | 4 | 0 - 4 | 1 | 12 | -11 | 0 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 3 | 3 - 0 | 9 | 1 | 8 | 6 |
| 2 Fleyr | 4 | 2 - 2 | 8 | 6 | 2 | 4 |
| 3 SÍ | 3 | 2 - 1 | 7 | 5 | 2 | 4 |
| 4 Fram | 3 | 1 - 2 | 3 | 7 | -4 | 2 |
| 5 ÍF | 3 | 0 - 3 | 1 | 9 | -8 | 0 |

# Mjølnir skræddi seg avstað

**Við tryggum 3-0 sigri í Trongisvági setti Mjølnir í fyrstu atløgu skápið upp á pláss**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Talan var um veruligan toppdyst í Trongisvági, tá Mjølnir kom suður á vitjan. Júst TB og Mjølnir hava seinnu árini verið støðug frammi í føroyska hondbóltsoddinum, og undan hesum dystinum høvdu bæði eisini fult stigatal eftir fyrstu dystirnar.,

Bæði høvdu tey tó víst veikleikar í løtum, og tí var spurningurin kanska, hvør teirra í størstan mun hevði megnað at rudda hesar úr spælinum undan oddadystinum.

Og til tann spurningin er svarið, at tað hevði Mjølnir helst. Klaksvíkskvinnurnar vóru snøgt sagt greitt omaná frá fyrsta bríksli. Munurin millum liðini var somikið stórur, at talan als ikki gjørdist um ta spennandi uppgerðina, sum mong høvdu vónað, og ikki minst mundi talan fyri mongu heimaáskoðararnar vera um stórt vónbrot.



*Tað var ikki altíð, at TB fekk lagt eitt nóg stórt trýst á Mjølnir. Her er blokkurin í øllum førum langt burturi*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

### KÍF er væl fyri

Tapið førdi við sær, at TB datt eitt pláss niður á talvuni. KÍF hevur nevnliga havt góðan byrð í seinastuni, og tær vunnu aftur um vikuskiftið.

Hesaferð var tað ÍF, sum vitjaði í Hoyvíkarhøllini, og tó at tær royndu at stríðast, so fingu tær ikki gjørt stórvegis við heimaliðið. Ein tryggur 3-0 sigur gjørdist úrslitið, og so er spurningurin, hvørt KÍF megnar at halda dampinum uppi komandi vikurnar. Næsti dysturin er á útivølli móti Mjølni, og tað kann í øllum førum gerast trupul uppgáva.

Seinasti dysturin hetta vikuskiftið var á Giljanesi, har fyrsta lokaluppgerðin í bestu kvinnudeildini var á skránni hjá Drátti og SÍ. Ikki óvæntað, so var tað Dráttur, sum vann dystin. Tey bæði fyrstu settini var ikki stórvegis at tosa um, men í triðja settinum var tó um reppið, at SÍ fekk nakað burturúr.

### Úrslit Meistaradeild kvinnur

Dráttur-SÍ 3-0 (25-14, 25-14, 25-23)
KÍF-ÍF 3-0 (25-18, 25-15, 25-22)
TB-Mjølnir 0-3 (17-25, 17-25, 22-25)

# SÍ er avbjóðarin

**Við sigri á Fleyr syrgdu sørvingar fyri, at tað fyrst og fremst eru teir, sum skulu taka dystin upp við klaksvíkingar**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Einki er at siga til, um teir á besta mansliðnum hjá Fleyr iðraðu seg sunnudagin. Teir høvdu so dyggiliga havt takið á SÍ, og við 2-0 leiðslu tóktust stigini ikki vera í vanda. Men sørvingar megnaðu at koppa øllum á høvdið, soleiðis at talan gjørdist um 3-2 sigur til gestirnar.

Dysturin varð sagdur at vera tann, sum skuldi gera av, hvat av feløgunum skuldi verða avbjóðarin hjá Mjølnir. Klaksvíkingarnir hava higartil í ár vunnið heimadystir móti bæði SÍ og Fleyr, men enn eru so tríggjar uppgerðir móti hvørjum parti eftir.

Og hesaferð vórðu tað so teir í SÍ, sum komu betri frá uppgávuni. Sum sagt, so hevði Fleyr takið. Og kanska skuldu teir havt vunnið. Men SÍ vildi ikki geva skarvin yvir. Sjálvt tá tað sá svartast út, so stríddust teir fyri hvørjum bólti, og tað gav eisini úrslit at enda.

Í botninum hittust Fram og ÍF, og her varð staðfest, at ÍF í løtuni tykist vera veikasta liðið í deildini. Nýtt fólk skal spælast inn, og tað hevur vanliga við sær, at úrslitini eru í lakara lagi í eina tíð, og tað mugu fuglfirðingar so smyrja seg við í løtuni.

### Úrslit Meistaradeild menn

Fram-ÍF 3-1 (25-19, 19-25, 25-22, 25-21)
Fleyr-SÍ 2-3 (25-23, 25-21, 12-25, 25-27, 11-15)

# Borðtennisúrslit

Kappingarárið í borðtennis byrjaði um vikuskiftið við fyrsta umfari av fimm í Grand Prix kappingini

Umleið 70 leikarar møttust til kappingarnar í Tórshavn, har fyrsta umfar í Grand Prix kappingini varð avgreitt.

Bólkavinnarararnir vórðu hesir:

**Bólkur J:** Marin Brattalíð, TBF, Bólkur I: Rasmus Potts, TBF, Bólkur H: Magnar Hentze, TBF, Bólkur G: Tróndur Tummasarson, TBF, **Bólkur F:** Páll Heri Nólsøe, TBF, Bólkur E: Teitur Justinussen, TBF, Bólkur D: Rói Agnarson, TÓR, Bólkur C: Christian Mouritsen, TÓR, Bólkur B: Gunnar í Dali, TBF, **Bólkur A:** Peter Niclasen, TÓR

Tryggingarfelagið Føroyar og Føroya Sparikassi stuðlaðu kappingini við vinningum.





*Fjølmenti stovningarfundurin tók einmælt undir við at stovna nýggja fótbóltsfelagið FS Vágar*
*Mynd: Edvard Joensen*

# Nýtt fótbóltsfelag í Vágum

**Umleið 60 fólk vóru komin saman á fundi í skúlanum á Giljanesi mánakvøldið. Endamálið við fundinum var at stovna nýtt fótbóltsfelag**

FÓTBÓLTUR
*Edvard Joensen*

**Vágar:**
FS Vágar er farið í søguna. FS Vágar er risið uppaftur og fer at luttaka í landskappingini komandi kappingarár.

Eitt sindur ørkymlandi kanska, men ikki verri enn tað plagdi at vera, tá forsætrisráðharrin fyrr boðaði frá, at kongaskifti hevði verið: »Kongen er død. Kongen længe leve«, plagdi hann at rópa.

Í kjalarvørrinum á tí málinum, sum verið hevur um lutøkuna í aðru deild, eftir at samstarvið millum SÍF og MB er slitnað, varð stevnt til fund á Giljanesi til tess at fáa nýtt felag strovnað, so meldast kundi til landskappingina komandi, áðrenn freistin er úti tann 19. november.

Ymsar fyriskriftir skulu haldast, og tí var átrokandi neyðugt at arbeiða skjótt.

Felagið varð stovnað eftir galdandi reglum. Tí syrgdi løgfrøðingur fyri. Fyribils nevnd varð vald, sum fekk álagt at fáa endaligu viðtøkurnar og tað, sum harvið fylgir, klárar fyrst í komandi ári.

Fundurin var fjølmentur, og hann samtykti einmælt ta arbeiðsgongd, sum ein arbeiðsbólkur legði fram.

Nýggja felagið eitur Fótbóltssamtakið Vágar, stytt FS Vágar ella FSV, og hevur heimstað í Miðvági.

Felagið fer at leggja seg eftir at luttaka í øllum kappingum í vaksnamannadeildunum hjá bæði kvinnum og monnum niður til unglingar ella dreingir. Tey smáu fara at leika í bygdarfeløgunum.

Felagið er ætlað at fevna um Vesturøkið, sum er Vágar og vestursíðan á Streymoynni. Og at áhugi er hinumegin Vestmannasund eisini, sást av, at eisini fólk haðani var á fundi, og ein kvívíkingur varð eisini valdur í fyrstu nevndina hjá nýggja FS Vágum.

Eitt tað fyrsta, nevndin i nýggja felagnum fer at gera, er at søkja felagum limaskap i Fótbólssambandinum.

# Havnar Fimleikafelag fyllir 95.

**Føðingardagurin er 9. desember, men longu komandi vikuskiftið verður felagið á Torginum í SMS**

FIMLEIKUR
*tíðindaskriv*

Fríggjadagin verður tombola og hugnabásur. Leygardagin verður tombola, hugnabásur, saltokapping, og stafettkapping á hondunum millum fimleikafeløgini. Havnar Fimleikafelagi hevur boðið hinum fimleikafeløgunum í landinum av, í einari saltokapping og í stafett á hondunum.

Eisini verður møguligt at vinna ein ferð við Atlantic Airways, um tú svarar spurnarblaðnum, sum fæst á torginum.

### Hugnabásur og tombola

Havnar Fimleikafelag fer at vísa nakrar gamlar og nýggjar myndir, umframt at felagið fer at hava nakrar upplýsingar um felagið hesi árini, so sum hvørjir formenn hava verið og hvørji mannaði fyrstu nevndina. Eisini verður møguligt at seta seg niur og fáa eitt prát við kend andlit úr felagnum. Afturat hesum verður tombola á skránni.

### Kappingar á torginum

Leygardagin kl. 12.00 leygarmorgun verður ein saltokapping sett í gongd. Felagið hevur sett hinum fimleikafeløgunum í landinum stevnu og skulu tey í 2 minuttir, vita hvørt felag klára at gera flest saltoir. Feløgini fáa møguleika at nýta 3 fimleikarar. Bæði gentur og dreingir kappast. Eisini verður stafettkapping. Hendan kemur at ganga fyri seg soleiðis, at fimleikararnir skulu ganga kapp á hondum. Vinnararnir fáa gávukort frá Bowlinghøllini.

### Myndainnsavning

Felagið er farið í holt við at gera sær eitt myndasavn. Endamálið er fyrst og fremst at ogna sær myndirnar, men um 5 ár, á 100 ára degnum felagsins, er ætlanin at hava stóra myndaframsýning, og er felagið tí áhugað at fáa so nógvar myndir sum gjørligt. Um onkur liggur inni við myndum, eru tey vælkomin at koma niðan á torgið við teimum. Felagið syrgir fyri at taka avrit av myndunum, so eigarin fær sína mynd aftur.

## Annfinn skal venja MB

MB hevur gjørt avtalu við Annfinn Danielsen, um at hann skal verða ungdómsvenjari hjá felagnum.

Annfinn Danielsen hevur seinastu árini verið í starvi hjá KÍ, har hann somuleiðis hevur tikið sær av yngru deildunum. Undan hesum var hann í drúgt áramál venjari hjá yngru deildunum í B36, har hann eisini sat í ungdómsnevndini í fleiri ár.

**-jm**

## Bara fimm møttu upp

Henrik Gerster kundi helst ynskt sær eina betri byrjan, nú hann skal taka sær av A-landsliðnum í manshondbólti.

Fyrstu venjingarnar vóru um vikuskiftið, men av teimum 21 leikarunum, sum høvdu fingið boð, møttu bara fimm leikarar upp.

Útvarpið visti mánadagin at siga, at øll avboðini tó vóru sambært avtalu við venjaran. Antin tí leikarar vóru skaddir, ella tí teir vóru burturstaddir.

**-jm**

## Wenger undir ákæru

Arsenal-venjarin Arsene Wenger verður nú ákardur av enska fótbóltssambandinum FA fyri ósportsligan atburð í sambandi við rokdystin millum Manchester United og Arsenal herfyri, sum United vann 2-0.

Eftir dystin fanst Arsenal-venjarin hvassliga at hollendska áleyparanum hjá United, Ruud van Nistelrooy, serliga fyri eina takling á Ashley Cole hjá Arsenal. Nistelrooy hevur fingið tríggjar daga leikbann fyri hesa takling, men Wenger hevði eisini at atburðinum hjá Van Nistelrooy sum heild.

Tá ið málið móti Arsene Wenger er avgreitt, er síðsta orðið í sambandi við rokdystin eisini sagt, verður sagt úr enska fótbóltssambandinum.

**-tn**

## Joel í Tottenham

Tað er nú greitt, at hollendingurin Martin Jol tekur við sum venjari í enska felagnum Tottenham eftir franskmannin Jacques Santini, sum í farnu viku segði seg úr starvinum av persónligum orsøkum.

Enskir miðlar hava gitt, at orsokin til uppsognina hjá Santini var trupulleikar í samstarvinum við ítróttarstjóran í Tottenham, danan Frank Arnesen, men hetta hevur danin víst aftur.

Martin Jol var hjálparvenjari hjá Santini, og nú hevur leiðslan í Tottenham so avgjort, at hollendingurin skal taka við eftir fransktannin.

**-tn**